Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinir Johannesen, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Tinglýsingargjald

Spurningar:

1. Hvussu nógv hevði tað kostað landskassanum at lækka tinglýsingargjaldið frá 1% til 0,5%?
2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at lækka tinglýsingargjaldið?

Viðmerkingar:

Seinastu árini hava átøk verið framd, ið skulu minka um bústaðartrotið, vit hava í dag. Sóknast hevur verið eftir einum fjølbroyttari bústaðarmarknaði, har møguleiki er at leiga, samstundis sum tað er vorðið torførari og dýrari at fáa sítt egna at búgva í.

Nøkur átøk eru gjørd, ið skulu basa hesum trotinum. Frádráttur til húsaútleigan, ið skal eggja fólkið at langtíðarleiga til fólk, er eitt. Í ár bleiv eisini ein bústaðarpakki samtyktur, ið gav Bústøðum eina lániheimild uppá 450 milliónir krónur at byggja bústaðir fyri, harav 250 milliónir krónur eru markaðar til leiguíbúðir.

Tó er ikki nakað gjørt, ið skal hjálpa fólki at seta føtur undir egið borð. Hóast fleiri ynskja sær eina leiguíbúð í dag, í mun til fyrr, so eru tað framvegis nógv, ið droyma um at seta føtur undir egið borð.

Í samgonguskjalinum stendur, at tinglýsingargjaldið verður lækkað aftur, eftir at tað í undanfarna valskeiði bleiv hækkað frá 0,5% til 1%. Ein lækking, ið fekk tinglýsingargjaldið aftur á tað stigið, hevði gjørt tað fíggjarligari lættari hjá familjum at sett føtur undir egið borð.

Hesin fyrispurningur verður settur fyri at fáa greiðu á, hvat ein tílík lækking hevði kostað, og um landsstýrismaðurin hevur ætlanir um at fremja hesa lækking.

Á Løgtingi, 26.mai 2021

Beinir Johannesen